# Veðrið



**Fimm-daga-for-søgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Strúkur í vindi av útsynningi, í kvøld upp í hvassan vind av suðri. Stundum regn ella mjørki og hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Hvassur vindur ella skrið av útsynningi og ælingur. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Hann minkar vindin niður í ein strúk av vestri og okkurt ælið, partvís kavi, men eisini sólglottar. Hitalagið millum ÷1 og +2 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin stormur av útsynningi, seinni útnyrðingi og ælingur, partvís vátaslettingur ella kavi og hitin millum 1 og 4 stig. Týsdagin upp í hvassan vind av suðri og útsynningi og regn. Væntandi lýggjari – millum 5 og 8 stig.

# Stovna landsfelag fyri lastbilaeigarar

*Leygardagin verður stovnandi aðalfundur av lastbilafelagið fyri alt landið. Samstundis fer Eysturoyar Bilstjórafelag í søguna, sigur Bjarni Bjarnastein, stigtakari*

Sveinur Tróndarson

Leygardagin verður stovnandi aðalfundur av nýggjum landsfelag fyri lastbilaeigarar.

Stigtakari til hetta felag er Bjarni Bjarnastein, sum í nógv ár var nevndarlimur í Eysturoyar Bilstjórafelag og sum var formaður í felagnum, tá tað legði árarnar inn - fyribils - tá kreppan av álvara herjaði landið í 1989-90.

Hann greiðir soleiðis frá:

– Vit høvdu eitt felag, sum virkaði væl í Eysturoynni, men tá kreppan kom var einki at hava felagið til. Einki var at gera hjá teimum fáu, sum varðveittu bilarnar, og m. a. eg sjálvur seldi mínar, sigur Bjarni.

Síðani eru samfelagshjólini aftur farin at mala og við tí eisini lastbilahjólini. Hetta hevði við sær, at einstakir limir í Eysturoyar Bilstjórafelag, sum jú bara var niðurlagt, vildu hava lív aftur í felagið.

– Tað gjørdu vit so í februar mánað í fjør, sigur Bjarni.

Av tí at Bjarni ikki longur hevur nakrar bilar, átti hann ikki at vera við í nevndini, men lastbilaeigararnir í oynni vildu kortini hava hann at vera verandi, og tí tók hann av.

Nú situr hann kortini sum løntur formaður, og tað hava lastbilaeigararnir hildið verið skilagott, tí so kann hann ganga á odda, tá felagið skal samráðast um eitthvørt.






*Bjarni Bjarnastein, sum er stigtakari til nýggja lastbilaeigarafelag, sum eftir ætlan verður stovnað leygardagin*
***Mynd: Jens Kristian Vang***

– Tá eg byrjaði setti eg næstan sum treyt, at felagið ikki bara skuldi fevna um Eysturoynna, og síðani februar í fjør hava vit kannað og fyrireikað grundarlagið fyri einum landsfelag.

*Er so grundarlag fyri tí?*

– Tað haldi eg vit kunnu siga. Eg havi havt fundir við ein stóran part av lastbilaeigarunum kring landið og allir teir eg havi tosað við heilsa felagnum vælkomnum, sigur Bjarni

*Men hvat verður so endamálið við felagnum?*

– Endamálið er at savnað allar lastbilaeigarar í landinum. Vit ætlað at gera tað so áhugavert at vera limur í hesum felagnum, at tað skal ikki loysa seg at vera uttanfyri, sigur Bjarni Bjarnastein.

Til stuttleika kunnu vit nevna, at lastbilatakstirnir ikki eru broyttir síðani 1989, so tað er ikki óhugsandi, at tað verður eitt mál nýggja felagið fer at taka upp.

Bjarni Bjarnastein vónar, at meginparturin av teimum 75-80 lastbilaeigarunum í landinum gerast limir í nýggja felagnum og íalt væntar hann at umleið 100 lastbilar vera umboðaðir.

**Riggaði bara í Eysturoynni**

Sum nevnt er æltanin við fundinum leygardagin at gera eitt landsfelag fyri lastbilaeigarar og tað er fyrstu ferð tað verður roynt.

Feløgini, sum fyrr hava verið, hava verið økisfeløg, men Bjarni Bjarnastein sigur, at tað var bara í Eysturoynni, at tað riggaði.

– Teir hava roynt, m. a. í Streymoynni fyrr, men tað gekk ikki sum ætlað. Harafturímóti gekk upp á stás hjá okkum í Eysturoynni og tað er nokk høvuðsorsøkin til, at tað eru vit, sum taka stig til landsfelagið, sigur Bjarni Bjarnastein at enda.




Lágtrýstið vestanfyri Ísland fer eystureftir og hevur lýggja luft við sær.




Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer spakuliga norðureftir og dýpist nógv.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | – |
| Nuuk | ÷13 |
| Qaqortoq | ÷3 |
| Ammassalik | ÷8 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | ÷3 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 1 |
| Lerwick | 4 |
| Aberdeen | 4 |
| London | 9 |
| Tromsø | ÷3 |
| Bergen | 0 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannahavn | 5 |
| Helsinki | ÷8 |
| Moskva | 1 |
| Berlin | 7 |
| Warzawa | 5 |
| Kiev | 4 |
| Bukarest | 3 |
| Paris | 8 |
| Madrid | – |
| Róm | 13 |
| Malorca | – |
| Athen | 15 |
| Malta | 16 |
| Tunis | 19 |
| Beijing | 2 |
| New Dehli | 21 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | – |
| New York | – |
| Miami | 20 |
| Los Angeles | – |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | – |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | – |




**Hitalagið mált frá 02./02. kl $06^{00}$–03./02. kl $06^{00}$. Hitin í gjár: 1,9°C**
Minsti hiti máldur í februar: **÷11,0°** Mesti hiti máldur í februar: **11,0°**




Avfallið: 1,5 mm – **mált frá 02./02. kl $6^{00}$–03./02. kl $06^{00}$**
Avfallið higartil í februar: 9,5 mm

## Vestfalskyrrindi

28. januar: Seinna kvarter
1. februar: Mánin longst frá jørðini
5. februar: Tendring

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp | sp | Vestmannasundi fp | sp | Mykinesfirði fp | sp | Nólsoyarfirði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp | sp | Hvannasundi fp | sp | Fugloyarfirði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. feb. | 5:39 | 17:59 | 4:39 | 16:59 | 4:54 | 17:14 | 7:39 | 19:59 | 8:39 | 20:59 | 3:54 | 16:14 | 2:54 | 15:14 | 5:54 | 18:14 | 6:54 | 19:14 | 5:24 | 17:44 | 6:39 | 18:59 |
| 5. feb. | 6:19 | 18:37 | 5:19 | 17:37 | 5:34 | 17:52 | 8:19 | 20:37 | 9:19 | 21:37 | 4:34 | 16:52 | 3:34 | 15:52 | 6:34 | 18:52 | 7:34 | 19:52 | 6:04 | 18:22 | 7:19 | 19:37 |
| 6. feb. | 6:56 | 19:14 | 5:56 | 18:14 | 6:11 | 18:29 | 8:56 | 21:14 | 9:56 | 22:14 | 5:11 | 17:29 | 4:11 | 16:29 | 7:11 | 19:29 | 8:11 | 20:29 | 6:41 | 18:59 | 7:56 | 20:14 |
| 7. feb. | 7:30 | 19:47 | 6:30 | 18:47 | 6:45 | 19:02 | 9:30 | 21:47 | 10:30 | 22:47 | 5:45 | 18:02 | 4:45 | 17:02 | 7:45 | 20:02 | 8:45 | 21:02 | 7:15 | 19:32 | 8:30 | 20:47 |



# Útjaðarabólkur mønusting

Jan Müller

– Atkvøðugreiðslan um at lata oljuvirksemi ganga út frá Suðuroynni er mønustingurin fyri útjaðarabólkin. Framferðin í hesum máli hevur víst, at teir, sum annars náttúrliga skuldu stuðla útjaðaranum, eitt nú Jógvan við Keldu í Klaksvík og vágatingmenninir, í veruleikanum hava avlívað útjaðarabólkin sigur ein sera vónsvikin Henrik Old, sum er nærum púra málleysur, nú tað enn einaferð eydnaðist at stinga Suðuroynna í ryggin. Og tað heldur Henrik Old, at Jógvan við Keldu fyrst og fremst hevur gjørt við ikki sjálvur at vera í tinginum, tá hetta fyrri Suðuroynna stóra mál varð viðgjørt og síðani við at seta annan mann fyri seg, sum atkvøður ímóti Suðuroynni. – Við at stinga hælan millum beinini stingur Jógvan við Keldu eisini Suðuroynna og alla útjaðaraætlanina í ryggin leggur Henrik Old aftrat.

Hann vísir á, at hetta er einki eindømi og sipar her til viðferðina, sum samgonguumboðini í útjaðarabólkinum hava givið Suðuroynni eitt nú í sjúkrahúsmálinum. Tá tað t.d. eydnaðist Jógvan við Keldu at fáa øll síni mál ígjøgnum aftur í tinginum viðvíkjandi sjúkrahúsi og autistaheimi í Klaksvík legði hann sektina á, hvat hendi við Suðuroyar Sjúkrahúsi.

Henrik Old: -Nú vit vóru við til at fáa bæði flogvøll og keikant við í oljulógina herfyri, hevði eg eisini roknað við, at vágatingmenn fóru ikki at seta fót fyri hesum. Men heldur ikki har vísti tað seg at vera nakar dugur í útjaðarabólkinum.

Hann skilur annars ikki, at optiónin skuldi fella á tingi. Harvið hevur man givið skarvin yvir mótvegis oljufeløgunum. – Okkara áskoðan hevur verið hon, at fer tú upp í eina oljuvinnu, so er tað fyrti, at Føroya fólk skal fáa sum fræggast burtur úr. Tað stendur greitt fyri mær, at tað er kapitalurin, sum her hevur sigrað, og tað sást eisini so týðuliga undir viðgerðini av málinum sigur javnaðartingmaðurin.